# LØGTINGIÐ

## TINGHÚSVEGUR 1 - 3

## GRANNSKOÐANARFRÁGREIÐING

## 2006

**FRUMRIT**

**Inngangur**
Vit hava grannskoðað tær kontur, sum eru á §1 í Landsroknskapinum fyri 2006 - roknskap løgtingsins, umsiting tess og stovnar, knýttir at løgtinginum.

*Frágreiðing okkara hevur verið send leiðsluni á umsiting tingsins, Súsonnu Danielsen, leiðsluni á Landsgrannskoðanini, Beintu Dam og Løgtingsins umboðsmanni, Sólju í Ólavsstovu, til ummælis. Teirra viðmerkingar eru tilskilaðar í frágreiðingini.*

**Grannskoðanin**
Í samsvari við alment viðurkendar grannskoðanarmeginreglur hava vit lagt til rættis og framt grannskoðanina við atliti at fáa grundaða sannføring um, at tað ikki eru týðandi skeivleikar ella vanta týðandi upplýsingar í ársroknskapinum. Undir grannskoðanini hava vit, eftir meting um týdning og váða, kannað grundarlag og prógv fyri upphæddum og øðrum upplýsingum í ársroknskapinum. Vit hava samstundis tikið støðu til roknskaparháttin og tær roknskaparligu metingarnar, sum leiðslan hevur gjørt. Eisini hava vit mett um, hvørt upplýsingarnar í ársroknskapinum sum heild eru nøktandi.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin er greiddur í samsvari við tey krøv, ið føroyska lóggávan setur roknskaparhaldi, og at hann gevur rætta mynd av fíggjarliga virksemi løgtingsins fyri 2006.

## Grannskoðanin

**Alment**
Vit hava við stakroyndum eftirkannað sannanina viðvíkjandi upphæddum og upplýsingum í rakstrar-roknskapinum. Vit hava gjøgnumgingið og mett um mannagongdir og innaneftirlit, ið hava týdning fyri hvussu rakstrarroknskapurin er uppsettur. Harumframt hava vit við stakroyndum kannað skjalatilfarið og tilhoyrandi bókingar. Vit hava við stakroyndum kannað kostnaðarskjøl, til tess at staðfesta, um rætti persónur hevur ávíst og váttað skjølini, um rætt er bókað og at skjølini annars hoyra stovninum til. Gjøgnumgongd okkara hevur ikki ført til nakrar viðmerkingar.

Undir grannskoðanini verða upphæddirnar í rakstrarroknskapinum kannaðar, samanhildnar við undanfarin ár og við givnum játtanum.

Vit hava somuleiðis gjøgnumgingið fundarfrágreiðingar hjá formanskapinum fyri 2006 og fram til 29. november 2007. Vit hava ongar viðmerkingar í hesum sambandi.

**Játtan**
Tann samlaða játtanin til løgtingið er uppá 61,6 mió.kr. og er sundurdeilt soleiðis niður á øki(mió.kr.):

| Stovnur | 2006 | 2005 | øking í % |
|---|---|---|---|
| Løgtingsarbeiði | 25,8 | 25,6 | 0,9 % |
| Nýggjur bygningur til Føroya Løgting | 24,5 | 10,0 | 145,0 % |
| Landsgrannskoðanin | 5,1 | 5,1 | 0,4 % |
| Eftirløn og bíðiløn til løgtingsmenn | 3,1 | 3,1 | 4,2 % |
| Løgtingsins umboðsmaður | 3,0 | 3,0 | 0,0 % |
| **Tilsamans** | **61,5** | **46,7** | **31,9 %** |

Játtanin til løgtingsarbeiði er sundurdeilt soleiðis(mió.kr.):

| Stovnur | 2006 | 2005 | øking í % |
|---|---|---|---|
| Løgtingsmenn | 17,2 | 17,1 | 0,2 % |
| Fyrisiting løgtingsins | 6,6 | 6,4 | 3,0 % |
| Stuðul til parlamentariskt arbeiði | 1,6 | 1,6 | 0,0 % |
| Eftirlitsuppgávur | 0,5 | 0,5 | 0,0 % |
| **Tilsamans** | **25,8** | **25,6** | **0,9 %** |

Sum tað framgongur omanfyri, so er tann størsta einstaka økingin í játtanini til ein nýggjan bygning til Føroya Løgting – ein øking uppá 145% samanborið við 2005.

Tann samlaða økingin er uppá 31,9 % samanborið við 2005 – hetta er ein øking uppá 14,9 mió.kr.

Verður sæð burtur frá bygninginum, er talan um eina øking uppá 381 t.kr. ella 1%.

**Lønir v.m.**

Lønir v.m. eru nógv tann størsti kostnaðarposturin hjá løgtinginum við tilhoyrandi stovnum. Tískil hevur grannskoðanin lagt serligan dent á at kanna lønarútgjaldingarnar v.m. fyri 2006. Kanningar okkara hava tikið støði í galdandi lóggávu, sáttmálum o.s.fr.

*Tingmenn*

Viðv. tingmonnum hava vit undir grannskoðanini kannað um samsýningar, kostnaðarendurgjøld og ferða- og dagpeningur uttanlands til løgtingsmenn er goldið í tráð við løgtingslóg nr. 12. frá 18. februar 1999 um samsýning og eftirløn løgtingsmanna. Eftirlønir og bíðilønir eru somuleiðis kannaðar. Samanhildið er við galdandi sáttmálar.

Tingmenn verða samsýntir samsvarandi 34. lønarflokki í tænastumannalógini, íroknað vanliga viðbót. Afturat hesum verður veitt árligt kostnaðarendurgjald, svarandi til flutningskostnað 100 ferðir aftur og fram árliga, koyripeningur millum heimstað og Tórshavn 100 ferðir aftur og fram árliga, tímapening fyri 10 tímar dagliga í 100 dagar, tó fyri Suðuroyar tingmenn fullur dagpeningur í 100 dagar. Tingmenn í Tórshavn, Hoyvík, á Argjum og Hvítanesi fáa ikki kostnaðarendurgjald. Harumframt verður veitt kostnaðarískoyti uppá kr. 2.000 um mánaðin.

Næstformonnum Tingsins og nevndarformonnum verður veitt ein samsýning, ið er kr. 30.000 árliga, tó so um tingmaður røkir meira enn eina av hesum uppgávum, so verður bert ein samsýning veitt.

Kostnaðarendurgjaldið verður lækkað við 1/100 av kostnaðarendurgjaldinum, fyri hvønn tingdag, tingmaður ikki møtir á løgtingsfundi. Løgtingsskrivstovan ger frádráttin upp á hvørjum ári í juni mánað. Vit hava staðfest, at tær reguleringar, ið eru framdar samsvara við undirliggjandi skjøl viðv. fráveru.

Grannskoðan okkara hevur eisini umfatað ferðaforskot og ferðauppgerðir hjá tingmonnum. Veitt verður ferðaendurgjald og dag- og tímapeningur eftir reglunum, sum eru galdandi fyri tænastumenn landsins. Reglurnar eru ásettar í rundskrivi frá fíggjarmálaráðnum dagfest 9. juli 1998 um tænastuferðir uttanlands v.m. Upphæddirnar eru ásettar í vegleiðing til ferðauppgerð fyri tænastuferðir uttanlands.

Reglurnar í hesum rundskrivum verða í høvuðsheitum fylgdar, men tað kemur fyri, at serliga uttanfyri Danmark ikki ber til at fáa innivist fyri ásetta takstin. Eisini kann viðmerkjast, at verður tingmaður bjóðaður uttanlands, saman við hjúnafelag, fær hjúnarfelagin dagpening og endurgjald á jøvnum føti við tingmannin.

Staðfest er, at í nøkrum førum verða ferðauppgerðir ikki gjørdar upp skjótast møguligt eftir heimkomu. Mælt verður til at betra hetta, soleiðis at ferðauppgerðir kunnu verða latnar løgtingsskrivstovuni skjótast til ber, soleiðis at tryggja verður, at møgulig skuld verður avroknað í seinasta lagi 3 vikur, eftir heimkomu, samsvarandi rundskrivi um tænastuferðir uttanlands, ið kom í gildi tann 1. juli 1998.

Eisini er í einkultum føri staðfest, at ferðauppgerðir ikki verða nóg nágreiniliga útfyltar, hvat viðvíkur endamálinum við ferðini. Heitt verður á tingfólk um at betra hetta, soleiðis at tað greitt framgongur hvat endamálið við ferðini er.

Ongar viðmerkingar eru annars í hesum sambandi.

**Løgtingsskrivstovan, Landsgrannskoðanin og Løgtingsins umboðsmaður**

Vit hava eisini fyri Løgtingsskrivstovuna, Landsgrannskoðanina og Løgtingsins umboðsmann kannað, um útgoldnar lønir v.m. eru samsvarandi galdandi lønarsáttmálum við avvarðandi feløg, eins og skjalprógv fyri umflokkingum, setanarskrivum v.m. eru kannað.

Leivur Harryson, landsgrannskoðari, hevur sagt seg úr starvi frá 1. januar 2008. Sum nýggjur landsgrannskoðari er settur Beinta Dam, sum sostatt tekur við starvinum hin 1. januar 2008.

Fleiri viðmerkingar eru ikki í hesum sambandi.

**Stuðul til parlamentariska arbeiðið**

Stuðulin verður goldin, sambært Floksskrivarareglugerð frá 25. januar 2000, við tilhoyrandi broytingum 1. mars 2000. Hvør flokkur fær grundgjald uppá 78 t.kr. Harumframt hevur hvør flokkur rætt til 42 t.kr. árliga fyri hvønn tingmann meira enn ein.

Sambært §7 í reglugerðini skal grannskoðari løgtingsins eisini grannskoða henda roknskapin.

Løgtingsskrivstovan umsitur stuðulin, men hvør flokkur skal tilnevna ábyrgdarpersón, sum hevur ábyrgdina av, at stuðulin verður umsitin, sambært reglunum.

Vit hava skjalagrannskoðað kostnaðirnar viðv. stuðli til parlamentariska arbeiðið. Løgtingsskrivstovan hevur góðkent og ávíst skjølini, sum ábyrgdarpersónur fyri viðkomandi tingbólk, hevur váttað.

Grannskoðan okkara hevur staðfest, at ábyrgdarpersónar eru tilnevndir. Flokkarnir høvdu ikki ognaryvirlitið tøkt, tá grannskoðanin bað um hetta. Tískil verður heitt á flokkarnar um at betra hetta, soleiðis at ognaryvirlitið altíð er dagført.

Sambært reglugerðini, skal í minsta lagi helvtin av stuðlinum nýtast til skrivara/r, t.v.s umframt løn, eisini frítíðarløn, arbeiðsmarknaðargjøld v.m.

Niðanfyri standandi talva lýsir, í hvønn mun síðstnevnda treyt er lokin:

| T.kr./flokkur | A | B | C | D | E | F | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Umboð á tingi | 7 | 7 | 7 | 1 | 8 | 2 | 32 |
| Grundupphædd §1 | 78 | 78 | 78 | 78 | 78 | 78 | 465 |
| Tingmannaupphædd §2 | 250 | 250 | 250 | 0 | 292 | 42 | 1.085 |
| Stuðul tilsamans | 328 | 328 | 328 | 78 | 370 | 119 | 1.550 |
| Nýtsla 2006 | 321 | 328 | 327 | 59 | 311 | 107 | 1.454 |
| Meir/Minninýtsla | -7 | 1 | -1 | -18 | -59 | -12 | -96 |
| Lønir | 256 | 325 | 275 | 27 | 167 | 82 | 1.132 |
| Helvtin av stuðli til lønir | Ja | Ja | Ja | Nei | Nei | Ja | Ja |
| - munur | 93 | 161 | 111 | -12 | -17 | 22 | 357 |
| Helvtin av kostn. til lønir | Ja | Ja | Ja | Nei | Ja | Ja | Ja |
| - munur | 96 | 160 | 112 | -3 | 12 | 28 | 405 |
| Max. helvtin av stuðli til annað enn lønir | Ja | Ja | Ja | Nei | Ja | Ja | Ja |

Sum tað framgongur av talvuni omanfyri so er talan um eina minninýtslu samanlagt uppá 96 t.kr., tó hevur sambandsflokkurin nýtt 1 t.kr. meir enn játtað. Flokkurin er gjørdur varugur við hetta av løgtingsskrivstovuni, og peningurin er kravdur aftur.

Treytin um, at minst helmingurin av stuðlinum skal verða nýttur til lønir, hava hvørki Tjóðveldi ella Sjálvstýrisflokkurin lokið. Verður hinvegin roknað, í mun til avhildnan kostnað, lýkur Tjóðveldi kravið, men ikki Sjálvstýrisflokkurin.

Spurningurin er, um ásetingin, at minst helvtin av stuðlinum skal verða nýttur til lønir, er nóg greitt orðað. Men sambært Løgtingsskrivstovuni, hevur formansskapurin tulkað ásetingina soleiðis, at í mesta lagi helvtin av stuðlinum kann brúkast til annað enn til lønir. Fyri 2006 lúka allir flokkar hesa áseting, fyriuttan Sjálvstýrisflokkurin.

Vit endurgeva § 4 í reglugerðini um "stuðul til parlametariskt arbeiði" frá 25. januar 2000 niðanfyri:

> *"§4 Í minsta lagi helvtin av stuðlinum eftir § 1 skal nýtast til skrivara/r, sum hevur skrivstovu í somu hølum sum flokkarnir á tingi"*

**Setanarskriv hjá Tinglimum**
Lóggávan ásetur, at løgtingsmaður, sum er í almennum starvi í mesta lagi kann starvast 50% av tíðini í hesum starvi, meðan hann er løgtingsmaður ella varamaður fyri løgtingsmann. Vit hava kannað, um skjalprógv fyriliggur frá arbeiðsgevarum, ið koma undir hesa reglu, sum kom í gildi pr. 1. august 1999.

Grannskoðanin hevur undanfarin ár víst á viðurskifti á hesum økinum sum ikki hava verið í lagi.

Formansskapurin móttók skriv frá Almannaráðnum um setanarviðurskiftini hjá Marjusi Dam, hin 11. apríl 2006, har víst var á, at Marjus Dam er farin í farloyvi, so leingi hann situr á tingi.

Somuleiðis verður eisini heitt á løgtingsskrivstovuna, um at innheinta skrivligar váttanir fyri at varatingmenn, ið eisini hava annað alment starv, eru í farloyvi so leingi teir sita á tingi.

Spurningurin er, um reglurnar sum heild eru nøktandi. Lógarkravið viðv. starvsumráði v.m. er greitt, men tað vanta greiðir sanktiónsmøguleikar, tá tingmaður ikki lýkur treytirnar.

**Nýggjur bygningur til Føroya Løgting**
Arbeiði við at byggja ein nýggjan bygning til Føroya Løgting, er nú um at verða liðugt. Grannskoðanin hevur víst á, at rættast hevði verði at gjørt ein byggiroknskap, soleiðis at formansskapurin regluliga kundi kunna seg um gongdina í arbeiðinum.

Landsverk lat hesa uppgávuna til Landsbyggifelagið at umsita.

Vit hava ikki fleiri viðmerkingar í hesum sambandi.

**Roknskapargóðkenning**
Í frágreiðing okkara undanfarin ár er heitt á formansskapin um, í sambandi við roknskapir, at innføra váttanarmannagongd fyri Landsgrannskoðanina, Løgtingsskrivstovuna og Løgtingsins Umboðsmann. Arbeitt hevur verið við málinum, tó uttan at avgreiða hetta. Heitt verður á formansskapin um at taka støðu til, um váttanarmannagongd skal setast í verk.

**Grannskoðanarfrágreiðing 2005**
Vit hava kannað og staðfest, at formansskapurin hevur viðgjørt og góðtikið grannskoðanarfrágreiðingina fyri 2005.

## Upplýsingar viðv. roknskapinum

Roknskapur løgtingsins við tilhoyrandi stovnum er settur upp í Landskassaroknskapinum fyri 2006.

Niðanfyri eru høvuðskontur á §1 settar upp. Yvirlitið vísir nýtslu og játtan fyri 2006. Upphæddirnar fyri 2005 eru somuleiðis vístar (t.kr.).

| | SKJAL | t.kr. 2006 | t.kr. Játtan | t.kr. 2005 |
|---|---|---|---|---|
| **Løgtingið** | | | | |
| Eftirløn og bíðiløn til løgtingsmenn | D | 2.974 | 3.201 | 3.018 |
| Løgtingsarbeiði | | | | |
| Løgtingsmenn | | 16.681 | 17.170 | 17.115 |
| Stuðul til parlamentariska arbeiðið | | 1.454 | 1.550 | 1.459 |
| Eftirlitsuppgávur | | 0 | 500 | 0 |
| Fyrisiting løgtingsins | | 6.295 | 6.598 | 6.252 |
| Løgtingsarbeiði tilsamans | A | 24.431 | 25.818 | 24.826 |
| Nýggjur bygningur til Føroya Løgting | E | 22.829 | 24.500 | 6.441 |
| | | **50.234** | **53.519** | **34.285** |
| **Stovnar, knýttir at løgtinginum** | | | | |
| Landsgrannskoðanin | B | 4.479 | 5.072 | 4.743 |
| Løgtingsins umboðsmaður | C | 2.742 | 3.000 | 2.648 |
| | | **7.221** | **8.072** | **7.392** |
| **Kostnaður, løgtingið tilsamans** | | **57.455** | **61.591** | **41.676** |
| Játtan tilsamans | | 61.591 | | 47.001 |
| **Minninýtsla í mun til játtan** | | **4.136** | | **5.325** |

Niðanfyri hava vit gjørt viðmerkingar til útvaldar høvðuskontur í mun til játtanir og í mun til 2005. Viðmerkjast skal, at sambært játtanarskipanina, skulu játtanir haldast á høvuðskontustigi, og somuleiðis skulu lønarjáttanir haldast. Frávik kunnu verða á standardkontum - undirkontur til høvuðskontur - í mun til tær ætlanir, stovnurin upprunaliga hevði.

**Samlaði raksturin**
Samanumtikið vísir roknskapurin fyri 2006, at talan er um eina minninýtslu í mun til játtan á øllum høvuðskontum. Kostnaðurin er samanlagdur 57,5 mió.kr., meðan játtanin er uppá 61,5 mió.kr. Kostnaðirnir eru hækkaðir samanlagt við 15,8 mió.kr., í mun til 2005. Høvuðsorsøkin til hetta er, at nýtslan í sambandi við nýggjan bygning til Føroya Løgting er 16,4 mió.kr. hægri í 2006 enn í 2005.

**Løgtingsmenn**
Niðanfyri er høvuðskontan løgtingsmenn nærri útgreinað til tess at lýsa kostnaðirnar, í mun til 2005 og í mun til ætlanina fyri 2006 (t.kr.):

| | 2006 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2005 | Munur 2005-06 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 13.175 | 13.250 | -75 | 13.147 | 28 |
| Keyp av vørum og tænastum | 1.378 | 1.895 | -517 | 1.770 | -392 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 0 | 0 | 0 | -6 | 6 |
| Ymiskur rakstrarkostnaður | 1.860 | 1.900 | -40 | 1.962 | -102 |
| Tilskot til útlandið | 270 | 225 | 45 | 243 | 28 |
| Søla av vørum og tænastum | -2 | -100 | 98 | 0 | -2 |
| Innanh. flytingar | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| | **16.681** | **17.170** | **-489** | **17.115** | **-434** |

Verður samanborið við játtanina er talan um eina minninýtslu viðv. lønum uppá 75 t.kr. Tó eru lønirnar øktar við 28 t.kr., samanborið við 2005. Somuleiðis er talan um eina minninýtslu í sambandi við keyp av vørum og tænastum uppá 517 t.kr., samanborið við játtanina. Samanlagt er nýtslan 489 t.kr. minni enn játtanin, eisini er talan um eina minninýtslu uppá 434 t.kr., samanborið við 2005.

**Stuðul til parlamentariska arbeiðið**

| | 2006 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2005 | Munur 2005-06 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 1.132 | 1.180 | -48 | 1.138 | -6 |
| Keyp av vørum og tænastum | 250 | 200 | 50 | 232 | 18 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 72 | 170 | -98 | 75 | -3 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 0 | 0 | 0 | 14 | -14 |
| | **1.454** | **1.550** | **-96** | **1.459** | **-5** |

Talan er um eina minninýtslu viðv. lønum uppá 48 t.kr. Eisini er ein minninýtsla uppá 98 t.kr. viðv. keypi av útbúnaði. Samanlagt er talan um eina minninýtslu uppá 96 t.kr., í mun til játtan. Kostnaðurin er 5 t.kr. minni í 2006 samanborið við 2005.

**Fyrisiting løgtingsins (Løgtingsskrivstovan)**
Niðanfyri er høvuðskontan løgtingsskrivstovan nærri útgreinað til tess at lýsa kostnaðirnar í mun til 2005 og í mun til ætlan fyri 2006 (t.kr.):

| | 2006 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2005 | Munur 2005-06 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 4.588 | 4.584 | 4 | 4.439 | 149 |
| Keyp av vørum og tænastum | 1.354 | 2.000 | -646 | 1.629 | -275 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 281 | 14 | 267 | 116 | 165 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 59 | 0 | 59 | 53 | 6 |
| Ymiskur rakstrarkostnaður | 13 | 0 | 13 | 14 | 0 |
| Søla av vørum og tænastum | -1 | 0 | -1 | 0 | -1 |
| Skattur og avgjøld | 0 | 0 | 0 | 1 | -1 |
| | **6.295** | **6.598** | **-303** | **6.252** | **43** |

Útgreiningin vísir, at kostnaðirnir eru 43 t.kr. hægri í 2006, samanborið við 2005. Størsta hækkingin, er í keypi av útbúnaði netto, ið er økt við 165 t.kr. Kostnaðurin til lønir v.m. er øktur við 149 t.kr., í mun til 2005, ímeðan keyp av vørum og tænastum er minkað við 275 t.kr., samanborið við 2005. Samanlagt er talan um eina minninýtslu, samanborið við ætlanina uppá 303 t.kr.

Í skjali A, eru omanfyri standandi kostnaðir nærri útgreinaðir.

**Landsgrannskoðanin**
Niðanfyri er høvuðskontan landsgrannskoðanin nærri útgreinað til tess at lýsa kostnaðirnar í mun til 2005 og í mun til ætlan fyri 2006 (t.kr.):

| | 2006 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2005 | Munur 2005-06 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 3.400 | 3.935 | -535 | 3.657 | -257 |
| Keyp av vørum og tænastum | 691 | 542 | 149 | 542 | 149 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 29 | 143 | -114 | 128 | -99 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 310 | 330 | -20 | 343 | -34 |
| Ymsar rakstrarútreiðslur | 2 | 2 | 0 | 2 | 0 |
| Løgtingsgrannskoðararnir | 47 | 120 | -73 | 70 | -23 |
| | **4.479** | **5.072** | **-593** | **4.743** | **-264** |

Sambært útgreiningini viðv. landsgrannskoðanini er talan um lækkingar á lønarøkinum - uppá 257 t.kr., í mun til 2005. Í mun til lønarkarmin er talan um eina minninýtslu uppá 535 t.kr. á lønarøkinum. Kostnaðurin til at keypa útbúnað fyri er lækkaður við 99 t.kr., í mun til 2005 – og frávikið í mun til ætlan er uppá 114 t.kr. Samanlagt hevur stovnurin eina minninýtslu uppá 593 t.kr. í 2006. Kostnaðirnir eru lækkaðir við 264 t.kr., í mun til 2005.

Í skjali B, eru omanfyri standandi kostnaðir nærri útgreinaðir.

**Løgtingsins umboðsmaður**

Niðanfyri er høvuðskontan Løgtingsins umboðsmaður nærri útgreinað til tess at lýsa kostnaðirnar í mun til 2005 og í mun til ætlan fyri 2006 (t.kr.):

| | 2006 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2005 | Munur 2005-06 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 2.146 | 2.220 | -74 | 2.011 | 136 |
| Keyp av vørum og tænastum | 427 | 550 | -123 | 426 | 1 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 16 | 50 | -34 | 52 | -35 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 152 | 180 | -28 | 160 | -8 |
| | **2.742** | **3.000** | **-258** | **2.648** | **93** |

Í mun til ætlanina er talan um eina minninnýtslu uppá 258 t.kr. Størsta minninýtslan er innan keyp av vørum og tænastum - minninýtslan er uppá 123 t.kr. Samanborið við 2005 eru kostnaðirnir øktir við 93 t.kr.

Í skjali C, eru omanfyri standandi kostnaðir nærri útgreinaðir.

**Grannskoðaraváttan**

Vit skulu vátta, at vit lúka lógarinnar habilitetstreytir, og at vit undir grannskoðanini hava fingið allar tær upplýsingar, vit hava biðið um.

Tórshavn, hin 1. desember 2008

**P/F Grannskoðaravirkið *INPACT***
statsaut. revisorar

Jógvan Amonsson  Óli Joensen
statsaut. revisor

**Undirritaðu vátta hervið at hava lisið grannskoðanarfrágreiðingina, hin ___ / ___ - 2008.**

| _______________ | _____________ | ________________ | ______________ |
|---|---|---|---|
| Hergeir Nielsen | Jógvan á Lakjuni | Alfred Olsen | John Johannesen |
| formaður | 1. næstform. | 2. næstform. | 3. næstform. |

## SKJAL A: LØGTINGSARBEIÐI

| Løgtingsmenn | t.kr. 2006 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2005 |
|---|---|---|---|
| Mánaðarlønt | 12.532 | | 12.624 |
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 307 | | 300 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 337 | | 223 |
| **Lønir v.m.** | **13.175** | **13.250** | **13.147** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - innanlands | 22 | | 12 |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 829 | | 904 |
| Ferðing og flutningur, onnur | 39 | | 79 |
| Umboðan | 157 | | 368 |
| Keyp av vørum annars | 1 | | 0 |
| Grannskoðanar-, roknskapar- og løgfrøðiligar tænastur | 0 | | 25 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 329 | | 381 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **1.378** | **1.895** | **1.770** |
| Søla av brúktum skrivstovuútb., maskinum o.ø. | 0 | | -6 |
| **Keyp av útbúnaði, netto** | **0** | **0** | **-6** |
| **Leiga, viðlíkahald og skattur** | **0** | **0** | **0** |
| **Avskrivingar o.a.** | **0** | **0** | **0** |
| Utreiðslugreiddar veitingar | 1.860 | | 1.962 |
| **Ymiskur rakstrarkostnaður** | **1.860** | **1.900** | **1.962** |
| Altjóða felagsskapir | 270 | | 243 |
| **Tilskot til útlandið** | **270** | **225** | **243** |
| Vørusøla til privat | -2 | | 0 |
| **Søla av vørum og tænastum** | **-2** | **-100** | **0** |
| **Skattur og avgjøld** | **0** | **0** | **0** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| **Keyps- mvg** | **0** | **0** | **0** |
| **Løgtingsmenn tilsamans** | **16.681** | **17.170** | **17.115** |

## SKJAL A: LØGTINGSARBEIÐI - framhald

| Stuðul til parlamentariska arbeiðið | t.kr. 2006 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2005 |
|---|---|---|---|
| Mánaðarlønt | 693 | | 568 |
| Tænastumenn | 96 | | 261 |
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 278 | | 249 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 28 | | 20 |
| Eftirlønir | 37 | | 40 |
| **Lønir v.m.** | **1.132** | **1.180** | **1.138** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 20 | | 0 |
| Umboðan | 1 | | 1 |
| Keyp av vørum annars | 73 | | 80 |
| Telefon | 63 | | 64 |
| Postgjøld | 2 | | 1 |
| Grannskoðanar-, roknskapa- og løgfrøðiligar tænastur | 8 | | 5 |
| Keyp av tænastum í sambandi við edv og kunningartøkni | 9 | | 9 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 73 | | 71 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **250** | **200** | **232** |
| Telduútbúnaður og edv-menning | 65 | | 55 |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 7 | | 21 |
| Søla av brúktum skrivstovuútb., o.ø. | 0 | | -1 |
| **Keyp av útbúnaði, netto** | **72** | **170** | **75** |
| Umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslur, bygningar | 0 | | 14 |
| **Leiga, viðlíkahald og skattur** | **0** | **0** | **14** |
| **Søla av vørum og tænastum** | **0** | **0** | **0** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| **Stuðul til parlamentariska arbeiðið - tilsamans** | **1.454** | **1.550** | **1.459** |

## SKJAL A: LØGTINGSARBEIÐI - framhald

| Eftirlitsuppgávur | t.kr. 2006 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2005 |
|---|---|---|---|
| **Lønir v.m.** | **0** | **0** | **0** |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **0** | **500** | **0** |
| **Søla av vørum og tænastum** | **0** | **0** | **0** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| **Eftirlitsuppgávur - tilsamans** | **0** | **500** | **0** |

## SKJAL A: LØGTINGSARBEIÐI - framhald

| Fyrisiting løgtingsins | t.kr. 2006 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2005 |
|---|---|---|---|
| Mánaðarlønt | 3.262 | | 3.180 |
| Tænastumenn | 631 | | 624 |
| Tímalønt | 228 | | 225 |
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 11 | | 12 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 109 | | 71 |
| Eftirlønir | 356 | | 346 |
| Endurgjald í sambandi við lønir | -9 | | -18 |
| **Lønir v.m.** | **4.588** | **4.584** | **4.439** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 59 | | 60 |
| Ferðing og flutningur, onnur | 14 | | -8 |
| Umboðan | 7 | | 8 |
| Orkukeyp - el | 37 | | 323 |
| Orkukeyp til hiting - olja, oljuúrdráttir og orka annars | 160 | | 157 |
| Keyp av pappíri og prentlutum | 4 | | 15 |
| Keyp av vørum annars | 153 | | 182 |
| Telefon | 192 | | 56 |
| Postgjøld | 12 | | 7 |
| Grannskoðar-, roknskapa- og løgfrøðiligar tænastur | 67 | | 64 |
| Trygging | 41 | | 58 |
| Keyp av tænastum í sambandi við edv- og kunningartøkni | 242 | | 271 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 368 | | 436 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **1.354** | **2.000** | **1.629** |

## SKJAL A: LØGTINGSARBEIÐI - framhald

| Fyrisiting løgtingsins | t.kr. 2006 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2005 |
|---|---|---|---|
| Telduútbúnaður og edv-menning | 26 | | 42 |
| Skrivstovuútbúnaður | 305 | | 0 |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 0 | | 76 |
| Søla av brúktum skrivstovuútb. | -50 | | -2 |
| **Keyp av útbúnaði, netto** | **281** | **14** | **116** |
| Húsaleiga | 10 | | 11 |
| Umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslur, bygningar | 49 | | 42 |
| **Leiga, viðlíkahald og skattur** | **59** | **0** | **53** |
| **Avskrivingar o.a.** | **0** | **0** | **0** |
| Kostnaðargreiddar veitingar | 13 | | 14 |
| **Ymiskur rakstrarkostnaður** | **13** | **0** | **14** |
| Vørusøla til privat | -1 | | 0 |
| **Søla av vørum og tænastum** | **-1** | **0** | **0** |
| Morarentur | 0 | | 1 |
| **Skattur og avgjøld** | **0** | **0** | **1** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| **Keyps- mvg** | **0** | **0** | **0** |
| **Fyrisiting løgtingsins tilsamans** | **6.295** | **6.598** | **6.252** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **LØGTINGSARBEIÐI TILSAMANS** | **24.431** | **25.818** | **24.826** |

## SKJAL B: LANDSGRANNSKOÐANIN

| Vanligt virksemi | t.kr. 2006 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2005 |
|---|---|---|---|
| Mánaðarlønt | 1.889 | | 2.165 |
| Tænastumenn | 1.050 | | 1.038 |
| Tímalønt | 161 | | 159 |
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 0 | | 0 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 82 | | 58 |
| Eftirlønir | 217 | | 237 |
| **Lønir v.m.** | **3.400** | **3.935** | **3.657** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - innanlands | 7 | | 6 |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 135 | | 125 |
| Ferðing og flutningur, onnur | 10 | | 7 |
| Umboðan | 8 | | 9 |
| Matur og drykkjuvørur | 2 | | 0 |
| Orkukeyp - el | 18 | | 20 |
| Orkukeyp til hiting - olja, oljuúrdráttir og orka annars | 26 | | 25 |
| Keyp av pappíri og prentlutum | 11 | | 9 |
| Keyp av vørum annars | 67 | | 109 |
| Telefon | 16 | | 20 |
| Postgjøld | 7 | | 8 |
| Trygging | 1 | | 3 |
| Keyp av tænastum í sambandi við edv- og kunningartøkni | 48 | | 61 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 334 | | 141 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **691** | **542** | **542** |
| Telduútbúnaður og edv-menning | 27 | | 59 |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 2 | | 69 |
| **Keyp av útbúnaði, netto** | **29** | **143** | **128** |
| Húsaleiga | 304 | | 320 |
| Langtíðarleiga og leiga annars | 4 | | 4 |
| Umvælingar- og viðlíkahaldskostnaður, bygningar | 0 | | 15 |
| Umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslur av maskinum v.m. | 2 | | 4 |
| **Leiga, viðlíkahald og skattur** | **310** | **330** | **343** |
| Kostnaðargreiddar veitingar | 2 | | 2 |
| **Ymiskur rakstrarkostnaður** | **2** | **2** | **2** |
| **Rentukostnaður o.a.** | **0** | **0** | **0** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - innt.** | **0** | **0** | **0** |
| **Keyps- mvg** | **0** | **0** | **0** |
| **Vanligt virksemi tilsamans** | **4.433** | **4.952** | **4.673** |

**SKJAL B: LANDSGRANNSKOÐANIN - framhald**

| Løgtingsgrannskoðararnir | t.kr. 2006 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2005 |
|---|---|---|---|
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 46 | | 43 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 1 | | 1 |
| | **47** | **120** | **44** |
| Ferðing og flutningur, alment sett- innanlands | 0 | | 0 |
| Umboðan | 0 | | 0 |
| Keyp av vørum annars | 0 | | 0 |
| Keyp av tænastuveitingum | 0 | | 0 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **0** | **0** | **0** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - útr.** | **0** | **0** | **0** |
| **Løgtingsgrannskoðararnir tilsamans** | **47** | **120** | **44** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **LANDSGRANNSKOÐANIN TILSAMANS** | **4.479** | **5.072** | **4.717** |

| SKJAL C: LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR | | | |
|---|---|---|---|
| **Vanligt virksemi** | **t.kr. 2006** | **t.kr. Ætlan** | **t.kr. 2005** |
| Mánaðarlønt | 1.295 | | 1.162 |
| Tænastumenn | 673 | | 621 |
| Tímalønt | 33 | | 43 |
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 9 | | 0 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 52 | | 30 |
| Eftirlønir | 179 | | 154 |
| Endurgjald ísamband við lønir | -94 | | 0 |
| **Lønir v.m.** | **2.146** | **2.220** | **2.011** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - innanlands | 1 | | 0 |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 80 | | 63 |
| Umboðan | 3 | | 26 |
| Orkukeyp - el | 9 | | 10 |
| Orkukeyp til hiting - olja, oljuúrdráttir og orka annars | 13 | | 12 |
| Keyp av pappíri og prentlutum | 6 | | 6 |
| Keyp av vørum annars | 41 | | 36 |
| Telefon | 34 | | 36 |
| Postgjøld | 10 | | 10 |
| Trygging | 1 | | 2 |
| Keyp av tænastum í sambandi við edv og kunningartøkni | 76 | | 61 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 153 | | 163 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **427** | **550** | **426** |
| Telduútbúnaður og edv-menning | 15 | | 18 |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 2 | | 34 |
| **Keyp av útbúnaði, netto** | **16** | **50** | **52** |
| Húsaleiga | 152 | | 152 |
| Umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslur, bygningar | 0 | | 8 |
| **Leiga, viðlíkahald og skattur** | **152** | **180** | **160** |
| **Ymiskur rakstrarkostnaður** | **0** | **0** | **0** |
| Søla av vørum og tænastum | 0 | 0 | 0 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. - útr. | 0 | | 0 |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| **LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR TILSAMANS** | **2.742** | **3.000** | **2.648** |

| SKJAL D: | EFTIRLØN OG BÍÐILØN TIL LØGTINGSMENN | | |
|---|---|---|---|
| **Kostnaður** | **t.kr. 2006** | **t.kr. Ætlan** | **t.kr. 2005** |
| Mánaðarlønt | 155 | | 51 |
| Tænastumenn | -8 | | 8 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 4 | | 4 |
| **Lønir v.m.** | **152** | **0** | **63** |
| Tænastumannaeftirlønir | 2.822 | | 2.955 |
| **Tilskot til einstaklingar** | **2.822** | **3.201** | **2.955** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| **EFTIRLØN OG BIÐILØN TIL LØGTINGSMENN TILSAMANS** | **2.974** | **3.201** | **3.415** |

| SKJAL E: | NÝGGJUR BYGNINGUR TIL FØROYA LØGTINGS | | |
|---|---|---|---|
| **Kostnaður** | **t.kr. 2006** | **t.kr. Ætlan** | **t.kr. 2005** |
| Mánaðarlønt | 0 | | 128 |
| **Lønir v.m.** | **0** | **0** | **128** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 0 | | 9 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **0** | **0** | **9** |
| Húsaleiga | 0 | | 0 |
| **Leiga. Viðlíkahald og skattur** | **0** | **0** | **0** |
| Frádráttur fyri løguløn | 0 | | 0 |
| **Ymiskur rakstrarkostnaður** | **0** | **0** | **0** |
| Bygningar, privat | 22.829 | | 6.304 |
| Vegir, tunnlar, havnir o.a. , alment | 0 | | 0 |
| **Bygging og løguframleiðsla** | **22.829** | **24.500** | **6.304** |
| **Skattur og avgjøld** | **0** | **0** | **0** |
| **Innanh. flyt. millum stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| Keyps-mvg | 0 | | 0 |
| **Keyps-mvg** | **0** | **0** | **0** |
| **NYGGJUR BYGNINGUR TIL FØROYA LØGTINGS** | **22.829** | **24.500** | **6.441** |